**Aðalfundur hjá Læknafelag Føroya – leygardagin 11. november 2023**

“Verð tú tann broytingin, sum tú ynskir skal henda í verðini”. Orðini eigur Mahatma Gandhi.

Ímyndin av áhaldandi at halda fast við tað, sum hann visti var rætt og fór at gagna fólkinum.

Mær dámar væl hetta sitatið.  Tað snýr seg um at ganga á odda. Á odda fyri síni søk.

Tað haldi eg er hóskandi til hetta høvið at røða fyri læknum. Valdi tó at verða eitt sindur modernað eisini, og spurdi ChatGPT-tøknina um

hon hevði eitt betri sitat, sum hóskaði seg til eina røðu fyri Læknafelagnum?

Og mín sann, um hon ikki hevði eitt. Eitt fitt sitat, sum leggur dent á tann menniskjaliga partin av læknafrøðini. Tað kemur her: "Medisin er bert ein partur av læknakynstrinum. Ein týðandi partur er at hava samkenslu, tol og forstáilsi fyri tørvinum hjá sjúklingunum. Uppgávan hjá læknum er ikki bara at lekja kroppin, men eisini at troysta og geva vón. Tit byggja brúgv millum vísindi og menniskjaliga umsorgan."

Eg vil takka fyri, at tit hava boðið mær her í dag. Tað er ein heiður fyri meg at fáa høvið at siga nøkur orð til aðalfundin hjá Læknafelagnum.

Tit hava ein ógvuliga sentralan leiklut í okkara heilsuverki. Tað verði seg á okkara sjúkrahúsum, sum serfrøðingar innan ymisk økir, ella úti um landið sum generalistar. - Sum nýligani útbúgvin, ið leita sær víðari serfrøði, ella sum royndir serlæknar, sum mynda økini. - Serfrøðingar øll somul.

Vit hava eitt gott og framkomið heilsuverk, sum veitir nógvar týdningarmiklar heilsutænastur til borgarar í Føroyum. Hetta er sokallaðar vælferðartænastur, sum eru grundleggjandi fyri trivnað og menning í samfelagnum. At vælferðartænasturnar skulu tryggjast, er millum høvuðsmálini hjá samgonguni.

## Gongdin seinastu árini

Heilsuøkið er í støðugari menning. Tað er at fegnast um, at viðgerðir alsamt gerast betri, og at fleiri kunnu liva væl og vera virkin, hóast sjúku. Eg haldi, at vit øll kunnu vera samd um, at tað hevur stóran týdning, at sjúklingar í Føroyum fáa ta bestu viðgerðina, sum vit, sum samfelag hava møguleika at veita.

Eftirspurningurin eftir viðgerðum økist i samsvari við, at menningin gevur okkum fleiri viðgerðamøguleikar,  - samstundis sum demografiska gongdin við fleiri eldri og fleiri við fleiri sjúkum, leggur eyka trýst á tænasturnar.

Í Føroyum er aldurssamansetingin ein avbjóðing, har yngru aldursbólkarnar eru smáir, sammett við teir eldru.

Hesar yvirskipaðu avbjóðingar eru sum so, tær somu, sum verkini í grannalondunum standa við. Ein munur er kortini, at føroyska heilsuverkið, orsakað av síni støðd, er rættiliga viðbrekið bæði tá umræður tilgongd og frágongd av starvsfólkum.

Tá vit í síni tíð valdu at flyta heimaftur til Føroya aftan á loknan lestur og nøkur ár í arbeiðið í danska sjúkrahúsverkinum, tóktist sum okkara heilsuverk var í einum aldudali í mun til rekruttering av serlæknum. Tørvurin á serlæknum var stórur og tað var sera avbjóðandi at fáa læknar til Føroyar at arbeiða. Summi økir vóru illa

mannaði, onkur avmannaði. Tað var onkuntíð torført at halda fast í optimismuni.

Tíbetur vendi gongdin í seinnu helvt av 2010'unum. Tað eru helst fleiri orsøkir til hesa broyting:

- Búskapurin vendi – tíðirnar gjørdust betri.
- Fleiri fólk fluttu til Føroyar, harvið eisini serlæknar og onnur heilsustarvsfólk.

  Men tað vóru eisini tit í Læknafelagnum, sum áhaldandi vístu á, at tað máttu gerast nøkur átøk frá politiskari síðu fyri at tryggja pening til at kunna seta serlæknar og at fáa tilfeingið sett av til útbúgving av læknum.

- Síðan 2017, ella seinastu sjey árini, hevur serstøk játtan verið á fíggjarlógini til at seta fleiri serlæknar í Sjúkrahúsverkinum, sokallaða “serlæknapuljan”.
- Játtanin til útbúgving av yngri læknum er økt nógv seinastu árini
- Sjúkrahúsverkið hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at fáa góðkenningar til fleiri útbúgvingarstørv – bæði intro-størv og partar av høvuðsútbúgvingarstørvum.
- Vit hava eina føroyska KBU-skipan.
- Raðfestingar innan ávís økir, sum hava gjørt tað møguligt at seta fleiri serlæknar í Sjúkrahúsverkinum.
- Nærum øll høvuðsútbúgvingarstørvini innan almen medisin hava verið sett seinastu nógvu árini.

- Talið av føroyskum læknalesandi er høgt.

  Hóast vit á ávísum økjum hava avbjóðingar við at rekruttera serlæknar, er talið av serlæknum økt nógv seinastu árini. Tað tykist at vera stórur áhugi millum føroyskar læknar, at koma aftur til Føroyar eftir lokna útbúgving.

  Tí er tað eftir mínum tykki umráðandi, at vit stremba eftir, at varðveita áhugan hjá ungum føroyskum læknum, at koma aftur til Føroyar eftir lokna útbúgving.

  Vit skulu framhaldandi arbeiða fyri at betra um møguleikarnar at fáa útbúgvingarstarv í Sjúkrahúsverkinum, og møguleikarnar at økja talið av útbúgvingarstørvum.

Skulu vit varðveita áhugan hjá føroyskum læknum at koma til Føroyar í KBU-starv, er eisini týdningarmikið, at vit kunnu bjóða fleiri intro-størv innan ymisk serøkir. Umframt høvuðsútbúgvingarstørv ella partar av høvuðsútbúgvingarstørvum.

## Dimensioneringsætlan (serlæknaplanlegging)

Hvussu skal so serlæknasamansetingin í okkara heilsuverkið verða í framtíðini. Hvørji serlæknaøkir skulu vit hava og hvussu skulu tey mannast? Higartil hevur tað verið nokk so tilvildarligt, hvussu økini hava verið útbygd og raðfest. Í øllum teimum álitum, sum seinastu nógvu árini hava verið gjørd, hevur verið eitt tilmæli um, at tað má

gerast ein sokallað dimensioneringsætlan – ein politisk støðutakan til hvørji serlækanøki vit skulu hava í Føroyum og hvør støddin á teimum skal verða. Hetta hevur tó ikki verið gjørt.

Sjálv haldi eg, at hetta er ein av fortreytunum fyri at vit kunnu seta út í kortið fyri okkara framtíðar heilsuverk, og tí er nú ein arbeiðsbólkur settur at gera eina dimensioneringsætlan – ella serlæknaplanlegging – fyri Føroyar. Tað vil siga, ein ætlan skal gerast, sum skal lýsa og meta um, hvørjar heilsufakligar førleikar føroyska heilsuverkið hevur tørv á frameftir.

Við eini dimensioneringsætlan hevur Sjúkrahúsverkið eitt betri grundarlag at gera eina miðvísa útbúgvingarætlan, sum skal stremba eftir at nøkta tørvin á serlæknum komandi árini.

## Universitetssjúkrahús

Vit hava eisini sett okkum fyri, at Sjúkrahúsverkið skal gerast eitt universitetssjúkrahús. Við einum universitetssjúkrahúsi verður eisini møguligt at bjóða heilsustarvsfólki bæði størv og granskingarmøguleikar. Mett verður, at tað fer at vekja áhugan hjá fleiri læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki at starvast í Sjúkrahúsverkinum.

Eitt universitetssjúkrahús er við til at fáa fatur á teimum dugnaligastu og royndu heilsustarvsfólkunum, tí tað eru júst tey starvsfólkini, sum arbeiða við útbúgving og gransking. Tað er við til at tryggja, at okkara Sjúkrahúsverk framhaldandi verður ført fyri, at veita sjúklingarøkt og sjúklingaviðgerð á høgum stigi.

Hetta kemur at geva okkum eitt heilt annað samband millum Sjúkrahúsverk og Fróðskaparsetrið, og her eiga vit eisini at innhugsa, hvussu vit fáa restina av heilsuverkinum og almen medisin við í somu menningartilgongd.

## Fólkaheilsustýrið

Nýtt Fólkaheilsustýrið er skipað, og farið er undir at menna og skipa stovnin til millum annað at veita heilsufakliga ráðgeving og vegleiðing, sum er tillagað føroysk viðurskiftir og umstøður.

Farsóttarmálsøkið verður yvirtikið á nýggjárinum. Tíðarskeiðið við koronafarsóttini, hevur víst okkum, at farsóttarmálsøkið eigur at vera á føroyskum hondum, og skal tillagast føroysk viðurskiftir.

## Granskingareindin í Sjúkrahúsverkinum

Við granskingareindini í Sjúkrahúsverkinum, har øll heilsugransking í Føroyum verður savnað, er skjøtil settur á eitt nýtt kapittul í føroyskari heilsugransking. Har eru umstøður at fáa eitt granskingarumhvørvi, har granskarar hava møguleika fyri at deila vitan og royndir, og á tann hátt fáa sínámillum samstarv og samvirkan. Hendan eindin kemur eisini at hava stóran týdning í menningini av universitetssjúkrahúsinum.

## Heilsupolitikkur skal orðast

Tað hevur eisini ligið mær á hjarta at fáa  sett orð á tær visjónir, sum vit sum land skulu hava fyri okkara heilsuøkið sum heild, soleiðis at vit yvirskipað kunnu siga, at vit í Føroyum hava ein heilsupolitikk. Tað hava vit ikki. Farið er undir fyrireikingarnar at orða uppskot til ein heilsupolitikk fyri Føroyar. Langtíðarætlanir skulu leggjast fyri heilsuøkið við ítøkiligum málum og visjónum.

Ein lutur í heilsupolitikkin er ein nýggj fólkaheilsuætlan, har vit dagføra okkara hugsanir um fyribyrging av heilsutrupulleikum, tí vit hava alstóra vitan um, hvat kann gerast fyri at fólk hava betri heilsu og at trýstið á heilsuverkið ikki alsamt økist av orsøkum, sum kunnu fyribyrgjast.

Eisini her verður tørvur á tykkum læknum, at tit eru frammi og brúka tykkara vitan á økinum til at gera vart við, hvussu tað við atferðarbroytingum kann bøtast um heilsuna.

**Nýskipan av heilsutænastunum í nærumhvørvinum**

Seinastu árini hava vit hoyrt nógv um avbjóðingar, sum hava verið í okkara primeru læknatænastu, - kommunulæknaskipanini, har tað hevur verið trupult at manna tær viðtalurnar sum eru. Nakað sum hevur verið við til at tyngja um hjá teimum, sum eru í starvi og av hesum og øðrum orsøkum hevur skapt ein mistrivna hjá fleiri.

Her eru avbjóðingar, sum vit hava sett okkum fyri at loysa, og sum eitt tað fyrsta eg gjørdi á hesum postinum var at tosa við umboð fyri kommunulæknarnar og hoyra tað, sum lá teimum á hjarta.

Tað eru nógvar ymiskar avbjóðingar. Nakað av hesum stendst av skipanarligum viðurskiftum, har ábyrgdin er spjadd ella ógreið og tí er neyðugt at vit fáa eina fakliga leiðslu fyri kommunulæknaskipanina og her er við at verða komið undir land at fáa sett ein fakligan leiðara, sum saman við myndugleikum og kommunulæknunum fær skipað viðurskiftini betri.

Tað er eftir mínum tykki eisini neyðugt at skapa og tryggja eitt betri og annarleiðis samspæl millum Sjúkrahúsverkið og tær heilsutænastur, sum fólk skulu hava í teirra nærumhvørvi.

Trýstið á Sjúkrahúsverkið fer eisini at vaksa munandi komandi árini og um vit ikki tryggja, at fólk fáa nøktandi tilboð í nærumhvørvinum, so hoknar Sjúkrahúsverkið undir byrðuni.

Hetta er ein av teimum týdningarmiklastu uppgávunum at fáa loyst á heilsuøkinum komandi árini.

-----

Læknafrøðin er ment nógv, men tað er heilt vist, at tað framhaldandi er nógv, sum fer at kunna gerast betri, ikki minst tá hugsað verður um tøkniligu menningina sum gongur við rúkandi ferð.

Vit skulu framhaldandi eggja til gransking og menning av nýggjum viðgerðum. Vit skulu styrkja serlæknaøkir við heilsustarvsfólkum og tøkni. Vit skulu eisini tryggja, at øll hava somu atgongd til tær neyðturviligu viðgerðirnar.

Tað er týdningarmikið at vit fylgja menningini, ikki minst tøkniligu menningini. Loysnir við telemedisin kunnu gera tað møguligt hjá fólki, at fáa atgongd til viðgerð, røkt og venjing frá serfrøðingum, uttan at skulu ferðast langa leið.

Vit standa eisini yvir fyri at skula hava eina aðra talgild heilsuskipan enn núverandi, og tað arbeiðið er sett í gongd og arbeitt verður á tí

tøkniliga støðinum nú, men her verður eisini stórur tørvur á tykkum klinikarum til at mynda nýggju skipanina. Hetta verður okkum ein stór og krevjandi avbjóðing, bæði hvat viðvíkur starvsfólkaorku og á tí fíggjarligu síðuni.

Sumt av tí sum stendur fyri framman á tøknifrøðiliga økinum er ilt at fara og spáa um. Heilt vist kemur vitlíki at spæla ein virknan leiklut á hesum økinum í framtíðini, og kemur væntandi at gera nakrar av vanligu mannagongdunum annarleiðis.

Viðgerð sum er tillagað tann einstaka, grundað á millum annað ílegur og sum verður rópt persónlagað viðgerð – er eitt økið, sum eisini er í stórari menning. Eitt nú, verður í Fólkaheilsustýrinum og granskingareindini arbeitt við at fyrireika umstøður og

undurstøðukervið til betri at kunna veita persónlagaða viðgerð í heilsuverkinum í Føroyum.

Tað er mín vón, at vit øll kunnu raðfesta fyribyrgingina nógv meira frammarlaga enn vit higartil hava gjørt.

Útlitini fyri framtíðina eru góð. Við vón um framhaldandi menning innan eitt nú persónlagaða viðgerð, nýggja framkomna tøkni, og einum vilja til at lætta byrðuna fyri bæði tann einstaka sjúklingin og fyri samfelagið, kunnu vit skapa eina betri framtíð fyri tey, sum hava tørv á heilsutænastum.

Vit øll, sum starvast á heilsuøkinum eru her fyri at tæna borgarunum.

Tit læknar eiga ein ógvuliga sentralan leiklut í menningini av okkara heilsuverkið komandi árini. Tað er mín væntan og vón, at tit í framtíðini, nú eins og áður, átaka tykkum leiklutin sum viðleikarar og geva tykkara fakliga íkast til tað, sum vit øll stremba eftir:

At vit framhaldandi tryggja, at okkara heilsuverk mennist til gagns fyri allar borgarar í Føroyum.

Tað harmar meg, at vit í løtuni strongja heilsuverkið ómetaliga nógv við longu konfliktini, vit hava havt seinastu vikurnar. Vóni, at hetta verður loyst nú, men hetta kemur at ávirka okkara Sjúkrahúsverk í langa tíð, tá vit skulu til at innheinta tað, sum hevur ligið á láni av hesum ávum.

Fegnist samstundis um, at teir yngru av tykkum, júst í hesum døgum, hava fingið tykkara sáttmála í hús.

Takk tit øll í Læknafelagnum.

Takk fyri tykkara íkast í okkara lítla heilsuverki. Hvør einstakur av tykkum ger mun. Sum myndugleiki virðismeta vit arbeiðið, sum tit gera í samfelagnum, sera høgt.

Síðan fari eg at ynskja tykkum ein framhaldandi góðan aðalfund.

Takk fyri!